VEÐRIÐ

Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið



Veðrið í dag:
Lot til andøvsgul av landnyrðingi og regn av og á. Hitin millum 9 og 12 stig.



Veðrið leygardagin:
Lot til andøvsgul av norði og útnyrðingi og sólglottar, men kanska okkurt ælið. Hitin millum 6 og 9 stig.



Veðrið sunnudagin:
Lot til andøvsgul av útnyrðingi og vestri og fyrrapartin yvirhøvur turt og sólglottar, men seinnapartin ælingur. Hitin millum 6 og 9 stig.

Veðrið mánadagin og týsdagin:
Lot til andøvsgul av útnyrðingi og sólglottar, men eisini okkurt ælið. Hitin millum 5 og 9 stig.

Gorpur Gamli vann í 1952

Í 1952 var kappróður fyri fyrstu ferð í Fuglafirði á Varmakeldu. Tvey áttamannafør róðu. Annað var Gorpur Gamli og hitt var ein bátur úr Gøtu. Peter Jacob Højsted eigur myndina omanfyri, og hann hevur greitt frá, hvussu róðurin gekk

ENDURMINNING

Solby A. Eliasen
solby@sosilauirin.fo

Peter Jacob greiðir frá, at Gorpur Gamli var ein gamal grindabátur, sum fleiri mans áttu. Á myndini síggjast tveir av teimum sitandi framman fyri bátinum.

Manningin hevði vant nógv til fyrsta Varmakeldukappróðurin, og eydnaðist tað eisini teimum at vinna. Peter Jacobi dámar ikki so væl at reypa, men hann sigur tó, at talan var um ein rættuliga sannførandi sigur. Báturin hjá teimum bleiv sleipaður inn á Fuglafjarða poll. Og so lógu teir har, inntil róðurin kundi byrja. Flennandi minnist Peter Jacob aftur á, at tað var mjørki.

– Vit kendu ikki málið, og tað segði róðursmaðurin hjá okkum eisini við hin. Tá tók hann so yvirlegin til, at tað skuldu vit ikki hugsa um, men bara rógva aftaná teimum inn, sigur Peter Jacob.

Men tað bleiv als ikki so. Bátarnir vóru nakað tættir í byrjanini, men endin var, at Gorpur Gamli vant burturúr hinum bátinum, og vann sostatt fyrsta FM róðurin á Varmakeldu nakrantíð.

Manningin á Gorpi Gamla í 1952, frá vinstru: Magnus úr Haraldsundi, Heini úr Oyndarfirði, Peter Jacob úr Funningi, Niclas úr Syðrugøtu, Svend úr Funningsfirði, Hans av Eiði, Christian úr Skopun, Jógvan úr Fuglafirði og Dia úr Norðragøtu. Teir báðir fremst á myndini eru tveir av eigarunum Christian og Harry, báðir úr Klaksvík. Myndin er tikin nakað norðarlaga á kaiini í Fuglafirði ella innan fyri har, sum Havsbrún liggur í dag

Hitalagið kring knøttin

Illulisat	6
Nuuk	8
Qaqortoq	5
Ammassalik	10
Saint John's	–
Halifax	–
Reykjavík	14
Seyðisfjørður	7
Tórshavn	10
Lerwick	11
Aberdeen	14
London	20
Tromsø	11
Bergen	14
Oslo	–
Stokkhólm	19
Keypmannah.	18
Helsinki	15
Moskva	20
Berlin	20
Warzawa	16
Kiev	18
Bukarest	23
Paris	25
Madrid	36
Róm	27
Malorca	30
Athen	30
Malta	30
Tunis	33
Beijing	21
New Dehli	38
Bangkok	33
Jakarta	31
Sydney	17
New York	28
Miami	31
Los Angeles	19
Meksikobýur	20
Panama	–
La Paz	11
Rio de Janeiro	–
Buenos Aires	11

LUFTTRÝSTIÐ



Eitt lágtrýst, 988 hPa. sunnan fyri Ísland fer móti Skotlandi og grynnist. Brúgvalagið haðani til Føroya stendur mestsum í stað.

Lágtrýstið við Hebridurnar fer eystureftir og grynnist. Eitt brúgvalag við Føroyar fer suðureftir og hevur kaldari luft við sær.

HITALAGIÐ



Hitalagið mált frá 30/06 kl. 06⁰⁰–01/07 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 10,4°
Minsti hiti máldur í juni: 0,0° - Mesti hiti máldur í juni: 20,0°

AVFALLIÐ



Avfallið: 10,0 mm – mált frá 30/06 kl. 06⁰⁰–01/07 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í juni: 98,4 mm

I EINUM SAMFELAG
HAR TEY VEIKASTU
HAVA TAÐ GOTT,
HAVA ØLL TAÐ GOTT

WWW.JAVNI.FO

JAVNI

VESTFALLSKYRRINDI

1. juli: Mánin næstur jørðini
2. juli: Fullmáni
5. juli: Jørðin longst frá sólini

Kelda: Almanakkin 2004

Dagur	Suðuroyar-/Vágafirði fp.	sp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði fp.	sp.	Hestfirði/Sundalagnum fp.	sp.	Vestmannasundi fp.	sp.	Mykinesfirði fp.	sp.	Nólsoyarfirði fp.	sp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp.	sp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi fp.	sp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp.	sp.	Hvannasundi fp.	sp.	Fugloyarfirði fp.	sp.
2. juli	07.04	19.36	06.04	18.36	06.19	18.51	09.04	21.36	10.04	22.36	05.19	17.51	04.19	16.51	07.19	19.51	08.19	20.51	06.49	19.21	08.04	20.36
3. juli	08.09	20.39	07.09	19.39	07.24	19.54	10.09	22.39	11.09	23.39	06.24	18.54	05.24	17.54	08.24	20.54	09.24	21.54	07.54	20.24	09.09	21.39
4. juli	09.10	21.38	08.10	20.38	08.25	20.53	11.10	23.38	—	12.10	07.25	19.53	06.25	18.53	09.25	21.53	10.25	22.53	08.55	21.23	10.10	22.38
5. juli	10.07	22.32	09.07	21.32	09.22	21.47	—	12.07	00.38	13.07	08.22	20.47	07.22	19.47	10.22	22.47	11.22	23.47	09.52	22.17	11.07	23.32

5 707265 100050 >